Vilja hava Scholes aftur á landsliðið

Hjálparvenjarin á enska fótbóltslandsliðnum, Terry Venables, vónar, at hann lokka Manchester United-miðvallaran Paul Scholes aftur á landsliðið. Scholes takkaði fyri seg á landsliðnum eftir EM í 2004, eftir at hann hevði spælt 66 landsdystir fyri Ongland.

- Fólk siga, at Scholes er givin á landsliðnum fyri altíð, men eg vóni, at eg kann fáa hann at broyta hugsan, sigur Venables við Sky Sports.

Ongland spælir EM-dystir tann 7. og 11. oktober ímóti ávíkavist Makedonia og Kroatia.

Hargreaves hevur brotið beinið

Enski landsliðsspælarin í fótbólti Owen Hargreaves hevur brotið beinið. Hetta hendi í dysti hjá Bayern Munchen leygardagin. Hargreaves rendi saman við ein mótstøðuspælara og noyddist at fara av vøllinum. Seinni varð staðfest, at talan var um beinbrot. Talan er tó um eitt minni brot, og Hargreaves skal ganga við beininum í gipsi næstu tríggjar vikurnar. Tað er tó framvegis óvist, nær hann kann spæla aftur.

HB-KÍ 5-1 (2-0):

HB upp á silvurplássið

HB

KÍ

HB reistist við einum knúsandi stórsigri á arvafíggindunum sunnudagin. Samstundis má KÍ ásanna, at landskappingarvegurin til europiskan fótbólt nú er heilt langur

FÓTBÓLTUR

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Undan dystinum sunnudagin hevði KÍ als ikki tapt á útivølli hetta kappingarárið, men tey hagtølini vórðu so ruddiliga ruddað burtur sunnudagin.

Úrslitið tosar nærum fyri seg í so máta, og tað var eisini skjótt greitt, at hetta avgjørt ikki varð dagurin hjá KÍ.

Barnasjúkur

Bara tveir minuttir vóru farnir, tá KÍ gav fyrsta dømið um, at teir hesa ferð als ikki vóru í rætta essinum til Formula-fótbólt. Gestirnir hildu seg í øllum førum hava góða tíð at stilla múr, tá HB hevði frískpark. Ivaleyst varð bíðað eftir, at Rasmus Nolsøe skuldi koma fram at skjóta, men ístaðin varð sent skjótt til Jákup á Borg, sum eins skjótt sendi inn til púra blankan Tór-Ingar Akselsen.

Hetta var eitt av klassisku dømunum um tær barnasjúkur – onkur vildi kanska sagt deyðssyndir – sum av og á verða framdar í fótbólti. Og klaksvíkingarnir vóru so langt ífra lidnir í so máta. Teir megnaðu annars at skipa tað, sum líktist einum veruligum trýsti móti HB eina løtu eftir leiðslumálið, og einar tværtríggjar ferðir gjørdist talan eisini um naskar royndir móti málinum hjá Bárði Johannesen.

HB tóktist samstundis í ferð við at fremja ein av klassisku brølarunum, sum liðið so oftani hevur framt í ár. Nevnliga at leggja seg ov djúpt, tá leiðsla er vunnin. Ætlanin var sjálvandi at lúra eftir kvikum kontrabóltum, og málið til 2-0 var júst dømi um slíkan. Og samstundis var tað enn eitt dømi um barnasjúkuna, tá annars garvaði Marek heldur óneyðugt misti bóltin á miðvøllinum, uttan at neyðuga uppbakningin var til staðar.

Smílini í HB-leguni vóru stór, tá KÍ varð spælt niður og norð í Gundadali. Sigurin lyfti HB upp á silvur-plássið í landskappingini

Mynd: Norðlýsið

Spælígleði og máttloysi

Hetta seinna málið var helst tað, sum punkteraði dystin av álvara. Efitr steðgin fekk HB veruliga loyvi at rulla seg út. Onkur tók til, at spælið var nakað av tí besta, sum liðið hevur sýnt í ár, og tað er kanska nakað um tosið. Men samstundis er tað ein sannroynd, at tað er lætt at spæla, tá mótstøðan er mótfallin.

Hóast klaksvíkingar fyir tað nógva fluttu fólkið væl aftur um bólthaldaran, tá HB var í álopi, so var so eiðasørt við trýsti á sama bólthaldara. Tí slapp HB í longum løtum at koyra sítt spæl, og við máltalvuni í bakinum mundu mongu rennitúrarnir hjá klaksvíkingum kennast eyka tungir av tí sama.

Dysturin kundi kanska tikið eina vend, tá Paul Clapson stútaði hornaspark móti málinum, men undirsíðan av tvørtrænum bjargaði HB, su m stutt eftir slerdi sigurin rimmar fastan. Hesa ferð tá Rókur fekk bæði tíð og pláss at draga uttan fyri brotsteigin.

Og so var leyst og liðugt. Rógvi Jacobsen fekk sær eitt mál móti barndómsfelagnum, tá markeringarnar hjá KÍ enn einaferð sviku, og tó at Rasmus Nolsøe var óheppin at gera sjálvmál, so nart hetta ikki við spælihugin hjá vertunum, sum eisini goymdu vakrasta máloið til seinast. Hetta tá Jákup á Borg og Kári Nielsen einsamallir runnu alt og øll niður í einum ferðmiklum kontra-raidi.

Vegurin til Europa

At grannarnir úr B36 samstundis taptu ber við sær, at HB nú er á silvurplássinum á stigatalvuni. Eftir lemjandi ósigurin fyri EB/Streymi í steypakappingini er landskappingin einasti vegurin til Europa, og tann møguleikan helt HB altso fast um og styrkti.

Hjá KÍ er vegurin umvegis Formula-deildina nú vorðin heilt langur. Lítið er tí at ivast í, at teir fyrst og fremst vilja leggja doyðin á steypakappingini, har Skála bíðar í hálvfinaluni. Ein hálvfinala, sum væl kann vísa seg at útloysa inntøkugevandi UEFA-atgongumerkini, um tað skuldi hent seg, at EB/Streymur basur B36 í hinari hálvfinaluni.

Málini í Gundadali

1-0: Tór Ingar Akselsen, 2. min
KÍ-verjan fæst við a stilla múr móti væntaðu frísparksroyndini frá Rasmus Nolsøe. Ístaðin tekur HB skjótt frískpark, og so kann Jákup á Borg leggja inn til púrasta blankan Tór-Ingar Akselsen. Skotið er ikki reint, men kortini nóg gott til at finna vegin til meskarnar.

2-0: Jákup á Borg, 29.
Marek tekur óneyðuga dribling á miðvøllinum, og so gongur skjótt. Rókur vinnur bóltin av honum, og við djúpari sending er Jákup á Borg púrasta blankur. Hann rekur fyrst framvið Meinhardt, áðrenn bólturin verður sendur í tóma málið.

3-0: Rókur av Fløtum Jespersen, 61.
Páll fær góða tíð, tá hann 20 metrar úr málinum fær bóltin. Hann vendir sær og tekur eitt trekk framvið mótstøðumanni, áðrenn hann langar bóltin flatt í vinstra málhorn.

4-0: Rógvi Jacobsen, 71.
Markeringarnar hjá KÍ svíkja av álvara, tá bólturin verður sendir inn fyri úr høgru. Mest sum inni í málteiginum fær Rógvi stundir at temja bóltin, áðrenn hann við høgra beinið mest sum skumpar kúluna í netið.

4-1: sjálvmál, 78.
KÍ sendir frísparksbólt innfyri úr høgru, og tá Rasmus tveitir seg framman fyri álopsspælara, er hann óheppin og skreðir bóltin inn við nærmara stólpa.

5-1: Kári Nielsen, 83.
KÍ hálvkiksar hornaspark, og so gongur kontra-álopið eftir bókini. Jákup á Borg setir sjálvur hetta ígongd, og umvegis eina millumstøð verður hann spældur aftur. Verjuspælarin ivast, men velur at elta Jákup, sum róliga rullar tvørtur um til enn betri stadda Kára Nielsen.

Byrjanin oyðileggur nógv

Lagið á klaksvíkingunum var sjálvandi einki serligt eftir stórtapið í Gundadali.

- Teir fáa eitt mál eftir bara einum minutti, og tað oyðileggur sjálvandi nógv fyri okkum. Og betri verður tað sjálvandi ikki, tá teir eisini fáa eitt óneyðugt mál til 2-0. helt Høgni Madsen, sum byrjaði dystin á beinkinum, men sum eftir góðum hálvan tíma varð sendir á miðvøllin fyri skadda Símun Joensen.

- Eftir steðgin royna vit tó at trýsta, og høvdu vit skorað, so kundu vit skapt spenning íaftur. Men tá teir so fáa triða málið, fer luftin púrasta úr okkum, haldi eg.

Hóast KÍ við hesum misti stórt fet í stríðnum eftir heiðursmerkjum, so avsannar Høgni, at tað nú bert er steypakappingin, sum telur.

- Enn eru 12 stig eftir at spæla um, og vit trúgva upp á møguleikan. Men tað krevur fyrst og fremst, at vit vinna okkara dystir, og so mugu vit síggja, hvussu leikur annars fer, sigur hann.

-mørk

Trongdi til

Í HB-leguni var lagið sjálvandi í topp eftir dystin.

- Hetta var akkurát tað, sum vit trongdu til. Tapið á Eiði sveið fast, og tí vóru vit allir sum ein samdir um, at hetta skuldi vaskast av okkum í dag, segði Vagnur Mohr Mortensen, sum allan dystin var í miðverjuni hjá HB.

Men hvat var tað so, sum riggaði í dag í mun til mikukvøldið?

- Eg haldi, at vit hava havt kensluna av hesum líka síðani mikukvøldið. Tað er fullkomuliga óhoyrt hjá HB í nýggjari tíð, at vit tvær ferðir hava lagt rygg til slík stórtap sum tey móti B36 og EB/Streymi. Fyri okkum sjálvar, leiðsluna og áskoðarar – ja fyri felagið sum heild máttu vit prógva, at vit duga meira enn hatta, og tað riggaði eisini. Eg haldi, at allir vóru topptendraðir frá fyrsta bríksli, og skjóta málið hjálpir sjálvandi eisini til í so máta. Og tá klaksvíkingarnir samstundis ikki vóru heilt so klárir, so gekk tað, sum tað gekk.

- Eg haldi, at vit mest sum alla tíðina høvdu fult tamarhald á. Teir hava kanska einstakar kjansir, sum tó ikki eru av tí stóra slagnum, og hinvegin skora vit upp á tað mesta hjá okkum, og effektivitetur er jú altíð ein dygd.

Og nú er málið væl at halda fast í silvurmerkjunum og harvið europiskum fótbólti komandi kappingarár?

- Enn hava vit so ein møguleika fyri gullinum, tó at hesin er lítil. So leingi hann er har, so stríðast vit sjálvandi fyri hesum, men silvurið skulu vit so í øllum førum hava, segði Vagnur.

-mørk